

*Uttan fyri strákirkjuna í einari bygd í Geresse*

sindur ymiskt ílætnir. Teir flestu vóru í stuttum buksum, troyggju ella jakka og summir við hatti. Fleiri við hvíta plagginum um herðarnar.

So við og við, sum fólkini av marknaðinum komu framvið, steðgaðu tey á og prátaðu við okkum. Nógv av teimum vóru trúgvandi. Tey sungu eisini fyri okkum.

Tey góvu sær góðar stundir, hóast mong teirra høvdu tímar at ganga heim.

## Heilsulæra

Nú eru vit aftur í 1990. Vit báðar Hanna, danska lærarinnan, komu úr Geresse til Galta fyri nøkrum døgum síðani.

Vit arbeiddu báðar á missiónsstøðini í Geresse, men komu til Galta við vissum millumbilum. Luthersk Missionsforening í Danmark hevur ábyrgdina av báðum støðum, men tað var eingin fastbúgvandi leiðsla í Galta beint tá.

Tá ið eg var her, plagdi eg saman við einum sjúkrahjálpara á klinikkini at fara út í onkra bygd við heilsulæru. Ein dagin fóru Engeda og eg til Geila, sum er umleið 8 km frá Galta. Bygdin liggur 700 metur lægri enn vit, so tað var undanbrekka allan vegin hagar. Veðrið var av tí fagrasta, tá ið vit fóru til gongu tíðliga um morgunin. Útsýnið er sera vakurt, so tað var ein frøi at síggja Guds undurfulla skaparverk.

Framkomin vórðu vit boðin inn til eini trúgvandi hjún. Har fingu vit kaffi við breyði og meis afturvið.

## Tørvur á upplýsingi

Formaðurin í bóndafelagnum rópti í hátalara, at nú skuldi vera heilsulæra, og øll máttu koma. Veðrið var gott. Øll sótu undir einum træi. Nógv var á skránni, og nógvir spurningar vóru báðar vegir.



*Eftir gudstænastu í Geresse. Lea keypti tvey teppi*



*Vatn var forkunnugt nógv staðni. Her hava konur funnið ein hyl*

Har er stórur tørvur á upplýsingi. Sum aðra staðni er tað soleiðis, at tá ið fólk hava høgan fepur, leyst lív og spýggju hava tey ta fatan, at tað er skeivt at geva teimum nakað at drekka. Tað eru óivað nógv, sum doyggja av hesi orsøk, og serliga eru tað børn.

Tá ið tey hoyrdu, hvussu umráðandi tað var at drekka nógv í slíkum førum, vórðu tey bilsin.

Hava tey ilt í hálsinum, verður úlvurin skorin. Tannrøturnar verða pilkaðar úr pinkubørnum, tá ið tey hava fepur. Hetta virkar alt øvugt og gevur búkilsku, leyst lív og spýggju.

Drekkivatnið verður oftast borið úr ánni, sum ikki er rein. Hetta elvir eisini til sjúkur.

Tey flestu hava ormar í innvølinum. Summir teirra eru skaðiligir og elva til blóðmangul.

Nógv børn eru niðurundirkomin, tí tey fáa ikki nóg mikið at eta ella ikki fáa rættan mat. Nógv hava tuberklar og smitta onnur. Tað sama er við AIDS, sum fyrr er greitt frá.

Vit tosaðu um hetta og mangt annað.

Eg legði til merkis ein eldri mann, sum fylgdi væl við tí, sum varð sagt. Hann setti eisini fleiri spurningar. Fólk eru fegin um at fáa at vita, hvat tey skulu gera og ikki gera í ymiskum førum. Vit mugu tó rokna við at skula endurtaka hetta næstu ferð, vit koma. Ikki fyrr enn tey síggja úrslit av tí, sum vit læra tey, vilja tey trúgva tí.

Tá ið vit góvust, vóru skýggj komin á luftina, og tað regnaði í fjøllunum eystanfyri.

Nevndu hjún bjóðaðu okkum inn aftur. Vit vóru ikki meira enn innkomin, tá fór at oysregna. Tað lak gjøgnum strátakið, so vit máttu flyta okkum stað úr staði. Matur var borin inn, søt eplir og kaffi. Húsmóðurin reisti seg og bað borðbøn. Vit sótu og prátaðu okkurt um ein tíma, tá sleit í. Engeda reisti seg so og bað eina bøn, áðrenn vit fóru.

Gøtan, sum vit gingu eftir um morgunin, var brøtt og ring at ganga í runu og hálku móti brekku.

Vit gingu tí eftir koyrivegnum, sjálvt um tað tók longri tíð. Italienararnir gjørdu vegin, tá ið teir hersettu landið 1936-41. Lítið og einki er gjørt við hann, men tó er hann frægari enn gøtan. Vegurin var heldur ikki so brattur sum gøtan og er tí lættari at ganga.

Eingin bilur hevði heldur kunnað komið til Galta, sum vegurin var aftaná regnið.

Alt gekk væl, og vit komu heim í øllum góðum. Her er nógv gott vatn í Galta, so tað var gott at kunna vaska rununa av sær, fáa sær ein bita og hvíla eina løtu.

Nakrar dagar seinni kom fyrr umtalaði eldri maður frá Geila higar til viðgerð á klinikkini. Eg spurdi, um hann mintist nakað av tí, sum vit førdu fram. Jú, tað gjørdi hann og endurgav nógv av tí.

Eg segði við hann, at nú mátti hann læra hini í bygdini um tað, hann hevði hoyrt, og tað lovaði hann eisini at gera.

## Innvølurin í geitini merkti hjúnarskilnaður

Í Galta gekk arbeiðið sína gongd. Tað kom væl av fólki at hoyra Guds orð. Á klinikkini vóru eisini fleiri sjúklingar komnir til trúgv.

Ein av hesum var ein maður, sum var borin til klinikkina. Hann var álvarsliga sjúkur og hevði einki skil. Skyldfólk hansara høvdu ofrað hønir og eina geit til satan fyri at fáa hjálp. Men hann bara versnaði.

Tá ið hann fór heim aftur frískur, boðaði hann frá, at hann saman við øllum sínum húsi vildi vera kristin.

Ein annar maður í besta aldri var borin til Galta langvegis frá um somu tíð. Hann hevði ligið heima eina tíð. Hann segði seg hava ofrað sjey hønur og eina geit til satan fyri at verða frískur. Teir, sum flettu geitina fyri hann, søgdu, at tað vóru merkir á innvølunum á geitini, sum merktu, at hann mátti senda konuna frá sær. Hann so gjørdi, og konan fór frá honum og fýra smáum børnum. Konan gifti seg síðan við einum øðrum.

Hesin maður sat nú eftir sjúkur við børnunum. Hann vildi eisini trúgva á Jesus.

## Ikki bara at siga tað at punktera

Vit vóru nú aftur í Arba Minch og vóru á ferð til Galta. Vit komu til býin Wolaita, hagar tað eru 110 km, og tá eru 180 km eftir til Galta. Komin seks kilometur frá býnum punkteraði eitt av hjólunum. So var at skifta hjól. Tá vísti tað seg, at tað var ov lítið av luft í eykadekkinum, sum eisini lak. Vit kláraðu kortini at koma aftur til Wolaita, áðrenn dekkið var heilt tómt. Elektrisitetið í býnum var tá farið, so hvørki bensinpumpur ella luftpumpur virkaðu. Á einum verkstaði fingu vit kortini vælt um slangurnar og pumpa luft í tær við handakraft. Alt hetta tók hálvan triðja tíma.

Vit fóru avstað aftur, men komnar 20 km á leið punkteraði hjólið aftur. Vegirnir vóru jú so sera ringir og fóru illa við dekkunum. Vit máttu so venda aftur til Woilata. Aftur tók tað hálvan triðja tíma til klárt var at fara avstað aftur. Tá vit nú høvdu koyrt 40 km punkteraði aftur. Vit skiftu hjól og hildu fram. Skjótt merktu vit aftur, at ikki alt ruggaði rætt. Tað vísti seg, at hjólið lak eitt sindur. Tað vóru nú 15 km til næsta bý, har vit kanska kundu fáa hjálp. Hetta var spennandi, og tá ið vit komu til hotellið í Selam Ber, sum var ein lítil býur, var hjólið flatt. Nú var klokkan 10 um kvøldið, so vit gistu á hotellinum. Einki verkstað var í býnum, so vit vistu ikki, hvussu tað fór at ganga at sleppa víðari. Tað oysregnaði alla náttina. So vit hugsaðu eisini um, hvussu tað mundi fara at ganga at sleppa um ánna, áðrenn mótbrekkan til Galta byrjar. Har kundi ofta vera leingi at bíða. Eingin brúgv var.